[ Mars ]




*Flogskiparin segði, at eingin vandi var á ferð, hóast hann ikki fekk lent á flogvøllinum í Vágum sum ætlað.*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Amerikanskt flogfar lendi á vatninum

**Eitt amerikanskt privatflogfar, sum var á veg úr Bergen til Reykajvíkar, lendi skírisdag á Sørvágsvatni, tí brek var við lendingarhjólunum, so flogfarið ikki fekk sett seg á flogvøllinum í Vágum**

Stutt eftir middag skírisdag fekk bjargingarliðið á flogvøllinum boð um, at eitt flogfar hevði trupulleikar við lendingarhjólunum og fór at seta seg á Vatninum. Bjargingarliðið sleipaði flogfarið á flúgvarabedingina, har mekanikarar hjá Atlantsflog umvældu brekið, og flogfarið helt fram til Íslands dagin eftir.

Flogskiparin, Alex Haynes úr Seattle í USA, ið var einsamallur við flogfarinum, segði, tá Sosialurin hitti hann seinnapartin skírisdag, at hann var á veg úr Finnlandi til USA við flogfarinum. Á vegnum hevði hann verið í Bergen og skuldi úr Vágum til Reykjavíkar.

Tá hann skuldi lenda í Vágum, varnaðist hann, at hann ikki fekk hjólini niður. Men av tí, at talan er um flogfar, sum bæði kann lenda á vatni og á landi, var eingin vandi á ferð yvirhøvur, og hann gjørdi av at seta seg á Vatninum.

### Áður verið í Føroyum

Lotið gjørdi tó, at hann ikki metti, at hann fekk vent flogfarinum, og tí var skilabest at sleipa tað at landi, greiddi hann frá. Tað gjørdi bjargingarliðið á flogvøllinum so, og flogfarið varð tikið upp á flúgvarabedingina, har mekanikarar hjá Atlantsflog umvældu brekið.

Alex Haynes greiddi frá, At hann fyrr hevur verið í Føroyum. Tað mundi vera einaferð í áttatiárunum, helt hann seg minnast. Tá ætlaðu føroyingar at fara undir flúgving millum Tórshavn og Suðuroy, segði hann. Men tað gjørdist ikki til nakað, so hansara »karriera « sum innanlands flogskipari í Føroyum mundi fara at avmarka seg til at flúgva hetta flogfarið av Vatninum niðan á flogvøllin at bunkra, tá brekið við hjólunum var umvælt, væntaði hann.

Tá flogfarið var komið upp á turt, vórðu hjólini vundin niður við handamegi, og mekanikarar hjá Atlantsflogi umvældu brekið.

---

» Um vit Føroyum ikki megna at orða nakrar visónir og strategiir og føra tær út verki, so fer tann dugnaligi føroyingurin aðrastaðni. Vit missa teir góðu heilarnar, tí hesir kunnu uttan trupulleikar fara aðrastaðni at arbeiða, har umstøðurnar eru betri. «

*– Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla*

» Tað eru kanska tey, ið undra seg yvir at nakar skal kunna búgva her í Nesvík. Men her er fint at búgva, skal eg siga tær. Onkutíð er tað gott nokk eitt sindur einsligt, men ikki einsligari enn hjá so nógvum øðrum fólkum. «

*– Árni Davidsen, einasti íbúgvin í Nesvík*

**Menninir hjá VÍF vinna føroyameistaraheitið í hondbólti.**
**SÍ vinnur meistaradeildina hjá monnum í flogbólti, og hjá kvinnum vinnur Mjølnir.**

## Besta skerpikjøtið funnið

480 gestir á Hotel Föroyum vóru dómarar í fyrstu kappingini nakrantíð um, hvat er besta skerpikjøt í Føroyum - fyri ikki at siga allari verðini. Tá fólkið hevði sagt sítt, stóð Páll Dalsgarð úr

Skálavík sum vinnari við undirtøku frá fjórðuhvørjari atkvøðu.

- Hetta hevði eg slett ikki væntað og hetta er ein stórur heiður. Ikki er sørt, at tað eisini forpliktar, segði Skálavíksbóndin.

## SISU flytir til Klaksvíkar

Eitt av fremstu vørumerkjunum hjá Restorff's Bryggjarí flytir til Klaksvíkar, har Føroya Bjór framyvir skal framleiða og selja tað.

Talan er um sodavatnið SISU, sum Restorff's hevur sloppið sær av við saman við øðrum sodavatnsmerkjum. Restorff's heldur ikki, at tað loysir seg at framleiða sodavatn í Føroyum.

- Vit halda avgjørt, at hetta er ein framleiðsla sum loysir seg, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór.

## Skaðfróir føroyingar

Fíggjarligt svik hevur við sær, at íløgubankin Phoenix má lata aftur. Nógvir føroyskir íleggjarar missa pening í krakkinum, og metingar vilja verða við, at talan er um einar 100 milliónir, sum føroyingar missa.

– Eg má bara siga, at tað er ótrúligt, hvussu skaðafrø fólk kunnu vera, tá tað gongst øðrum illa, sigur ónevndur vinnulívsmaður, sum sigur seg hava mist munandi upphæddir í Phoenix-krakkinum.

## Stjórin takkar fyri seg

Óli Hammer leggur frá sær sum stjóri fyri Smyril Line. Hann hevur í 22 ár verið stjóri, og hann var eisini ein av stovnarunum av felagnum. Nú Smyril Line verður endurreist fíggjarliga, hevur Óli Hammer valt at takka fyri seg.

– Stundin er komin at lata yngri kreftir sleppa framat. Eg havi verið stjóri í Smyril Line í meira enn 22 spennandi ár, og nú er tíð at fara, sigur Óli Hammer.